# Leiðarar á skúlabonk



*Georg Suðurgarð undirvísir á nýggju Diplomleiðaraútbúgvingini*

**Skeiðsdepilin við Marknagil er farin undir eina nýggja útbúgving fyri leiðarar. Talan er um Diplomleiðaraútbúgving. Georg Suðurgarð er leiðari á Skeiðsdeplinum við Marknagil**

ÚTBÚGVING
*Magnus Gunnarsson*

Diplomleiðaraútbúgvingin er væl kend, eitt nú í Danmark, har fleiri av handilsskúlunum bjóða hesa útbúgving. Útbúgvingin verður roknað sum ein góð barlast hjá leiðarum. Serliga hjá teimum, sum hava arbeitt við leiðslu, men ikki hava nomið sær útbúgving innan starvsfólkaleiðslu. Georg Suðurgarð hevur verið við til at ment hesa útbúgving í Danmark. Hann hevur gjøgnumført diplomleiðaraútbúgvingina í Danmark og í Grønlandi, og nú er túrurin komin til Føroyar. Hósdagin 27. mars var so skjøtil settur á diplomleiðaraútbúgvingina á Skeiðsdeplinum við Marknagil. 20 luttakarar vóru á fyrsta liðinum, meðan 10 luttakarar eru á bíðilista til lið 2, sum byrjar síðst í apríl ella fyrst í mai. Skeiðini verða hildin á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Tað er Føroya Handilsskúli og Tekniski Skúlin, sum reka Skeiðsdeplinum við Marknagil (SDM).

### Betri leiðarar

Útbúgvingin er gjørd til leiðarar, ið ynskja at blíva betri leiðarar. Við leiðslu meinast ikki einans við fíggjarstýring, framleiðslustýring o.l., men vanliga praktiska leiðslu við menniskjum. Góðir leiðarar hava eina heildarfatan av leiðslufunktiónini í fyritøkuni, samstundis sum teir duga at brúka hana í sínum dagliga arbeiði.

Útbúgvingin er uppbygd sum ein læra, ið er bygd á royndir, t.v.s. at tað verður arbeitt við: vitan, hugburði og í verki – frá teori til praksis.

Endamálið við útbúgvingini er at geva núverandi og komandi leiðarum í privatum og almennum fyritøkum eina miðvísa kunning í leiðslufunktión.

Útbúgvingin tekur tvey ár, men luttakararnir møta 10 ferðir um hálvárið. Skúlagondin er frá klokkan 9-16.

Skeiðluttakararnir í fyrsta skeiðinum ynsktu t.d. at fáa betri kunnleika til góða praktiska leiðslu, ikki einans teoretiska, men at duga betur at skipa dagliga arbeiði. Áhugaði kunnu venda sær til Skeiðsdepilin við Marknagil. Tel. 318813 ella teldupost: dt@hsh.fo


VARPIÐ

Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag

20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2




# Skansatangi á krabbaveiðu

**Saknsatangi, sum saman við Research varð tikin úr vinnu fyri stuttum, verður skjótur aftur í flotan. Kollfirðingar hava keypt hann til krabbaveiðu undir Føroyum**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*





*Skansatangi fer aftur í vinnu nakað skjótt. Hann skal fiska krabba á djúpum vatni undir Føroyum*

*Mynd: Skipalistin*

Kollfirðingar ætla at fara at royna eftr krabba undir Føroyum. Teir hava keypt Skansatanga og gera hann nú út til hesa nýggju veiðuna. Spaniólar skulu keypa krabban.

Finnbogi Hansen í Kollafirði hevur saman við Holgari Johansen keypt Skansatanga. Finnbogi vil ikki siga, hvat skipið er keypt fyri, men bara at prísurin var rímiligur.

– Holgar er royndur á økinum, greiðir Finnbogi frá. Hann hevur í fleiri ár verið við til krabbafiskiskap í Grønlandi, og veit tí, hvussu farast skal fram.

Teir siga Skansatanga vera væl egnaðan til hesa veiðuna. Tað eru hekkutrolarar yvirhøvur, sigur Finnbogi Hansen. Alt verður sett út av hekkuni, so gott pláss kemur væl við. Drigið verður aftur sum við línu.

Teir fara ætlandi at royna út suður av grunnunum suðurvestantil, sigur Finnbogi Hansen. Suður móti markinum á djúpum vatni.

Krabbin verður hildin livandi umborð, og landað verður væntandi einar tvær ferðir um vikuna, sigur hann. Krabbin verður lagdur í kassar, sum skulu standa kalt og myrkt. Eitt sindur av sjógvi verður spulaður á soleiðis av og á, og so kunnu teir halda seg livandi einsar tríggjar dagar ella so.

Teir hava tryggjað sær marknað, sigur Finnbogi Hansen. Spaniólar keypa tað, sum er. Fyrrverandi fiskasølustjórin, Hans Johannes á Brúgv, sum í løtuni býr í Spania, fer at selja fyri teir.

Krabbin verður tikin sundur, tá hann er komin i land, og so verða kløur og kroppur fryst hvørt sær.

Einir seks - átta mans fara við Skansatanga, tá farið verður til fiskiskap nakað skjótt. hann liggur í løtuni á Fuglafirði, har spæl verður sett umborð, og onkrar aðrar umbyggingar verða gjørdar.

Finnbogi Hansen sigur, at teir hava enn ikki gjørt av, um skipið framhaldandi fer at eita Skansatangi, ella tað fer at skifta navn.

# Føroyar hava uppiborið politiskan stabilitet

**Føroyar hava uppiborið eina arbeiðsføra samgongu og politiskan stabilitet, sigur Sambandsflokkurin í niurstøðu á landsfundinum, sum var í Sørvági um vikuskiftið**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*



*Hesir tríggir vóru eisini á Sambandsfundi í Sørvági*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Sambandsflokkurin bjóðar sær til at taka við landsins leiðslu, men byrjast skal av nýggjum, og fólkið skal sleppa at tala, veðrur sagt í landsfundarsamtykt Sambandsfloksins

Føroya fólk hevur uppiborið eina arbeiðsføra samgongu og politiskan stabilitet. Brúk er fyri flokkum og persónum, sum kunnu vísa á loysnir á landsins trupulleikum, siga sambandsfólk.

Heldur enn at læsa okkum inni vil Sambandsflokkurin troyta teir vinnumøguleikar, ið vitan og samvinna við aðrar kann geva, og herundir kanna møguleikarnar fyri betri samstarvsformi ella tilknýti til ES felagsskapin. Flokkurin hevur sett hol á kjakið um henda spurning.

Sambandsflokkurin staðfestir í síni landsfundarsamtykt, at yvirtøkur koma ikki uppá tal, uttan tær eru væl fyrireikaðar og føroyska samfelagið orkar at umsita og bera tær fíggjarliga.

Spurningurin um, hvat vit vilja við okkara heilsuverki, skal takast upp í álvara og viðgerast, og kannast skal í æsir, hvussu støðan er, og hvar støðið skal leggjast, sigur flokkurin.

Menning av vinnulívi, mentan og sosialari vælferð er málið, sum best kann røkkast við virðiligum og álitisfullum samstarvi innan ríkisfelagsskapin.

Hesar uppgávur metir Sambandsflokkurin seg vera best føran fyri at røkja, og sigur eisini, at flokkurin er støðufastur í hesum spurningi.

– Ongin skal ivast í støðu Sambandsfloksins til ríkisfelagsskapin, ikki bert meðan samfelagið verður útbygt og almenna skuldin verður niðurgoldin.

Tað er ikki altíð at tann minsti parturin í einum felagsskapi er tann týdningarminsti, men flokkurin ásannar, at saman við Grønlandi og Danmark standa vit sterkari, sigur Sambandsflokkurin at enda í landsfundarsamtykt síni.

# Fluttur fóðurflaki

**Ein aliflaki av Gøtuvík er fluttur vestur í Vágar og verður lagdur út til aliringarnar suður úr Giljanesi**

ALIVINNA
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Ein stórur aliflaki er komin vestur í Vágar, har alistøðin Fútaklettur skal brúka hann sum fóðurflaka við aliringanar undir Prestlandinum.

Atli Gregersen, stjóri á Fútakletti, sigur, at talan er um ein flaka, sum fluttur er av Gøtuvík vestur í Vágar.

Virksemið á Gøtuvík er í álvarsligari minking orsakað av staðfestari ILA sjúku har, so brúk er ikki fyri flakanum á Gøtuvík meira, sigur Atli Gregersen.

Tað hava verið tveri aliflakar á Gøtuvík, sigur Atli Gregesen. So tá nú virksemið fór at minka so munandi, varð gjørt av at flyta annan flakan vestur í Vágar. Allur fiskur á Gøtuvík skal takast, nú sjúka er staðfest.

Tað er tó als eingin vandi við at flyta ein brúktan aliflaka av Gøtuvík vestur í Vágar. Flutningurin er undir sera strongum eftirliti, sigur Atli Gregersen.

Flakin er fyrst sóttreinsaður væl og virðiliga í Gøtu. Síðan hevur hann verið á sleipistøð í Havn, har hann aftur er reinsaður og málaður uttan. Sostatt skuldi einki, sum eitur smitta yvirhøvur, verið á honum, sigur Atli Gregersen.

Alivinnan livir eitt strævið lív í løtuni, ásannar Atli Gregersen. ILA sjúkan er staðfest nógvastaðni, men hevur ikki fyri neyðini at vera nøkur rætitlig vanlukka kortini, sigur hann. Tað velst um, hvussu tíðliga hon verður staðfest, eftir at fiskurin er settur út. Er komið tætt at tøkutíð, er eingin trupulleki sum so, tí tá kann fiskurin brúkast. Tá er tað bara sjúkan og ikki prísurin, sum avger tíðina, tá tikið verður.

Verður hinvegin staðfest ILA skjótt eftir útseting, er verri vorðið., tí tá fæst einki fyri fiskin, sigur Atli Gregersen.



*Aliflakin hjá Fútaklettir er sóttreinsaður undir strongum eftirliti, áðrenn hann er fluttur av Gøtuvík vestur í Vágar*

*Mynd: Edvard Joensen*